# Fullveldisføroyingar kunnu ikki vera skiparar undir DIS



Val X

**HELGI ABRAHAMSEN**
Sambandsflokkurin

Á veljarafundi í Klaksvík sunnukvøldið, varð spurningur settur við, um føroyingar kunnu vera skiparar undir donskum flaggi, um Føroyar gerast fullveldi.

Heidi Petersen svaraði, at tað fór ikki at verða nakar trupulleiki.

Men trupulleiki verður tað !

Á heimasíðuni hjá Dansk Søfartsstyrelse stendur um manning av DIS skipum:

"Alle skibe, der sejler under dansk flag, herunder i Dansk Internationalt Skibsregister, skal opfylde Søfartsstyrelsens krav til sikkerhed, beskyttelse af havmiljøet, arbejdsmiljø, social beskyttelse m.v.

Søfartsstyrelsen fastsætter bemandingen ("safe manning"). DER ER KRAV OM, AT SKIBSFØREREN ER DANSK STATSBORGER, OG DER KAN IKKE DISPENSERES FRA DETTE KRAV."

Hetta sigur lógin, og tí er eingin orsøk at fyrigykla fólki, at fullveldisføroyingar, uttan danskan ríkisborgararætt, kunnu vera skiparar undir DIS.

# Politiskt vegamót – nýggj mál á skránna



Val X

**REIDAR NÓNFJALL**
Valevni Sambandsfloksins 2008

Føroyar standa politiskt við eitt vegamót – vit skulu velja, um vit lata standa til ella gera nøkur ítøkjulig val til hetta løgtingsval 2008.

Óendaligur stabilitetur og stór sjálvsnøgd er tað mest skaðiliga, sum kann henda fyri eitt samfelag – tí fari eg at heita allar veljarar, um at seta til nýggjar persónar í politiska arbeiðinum.

Fái eg álitið at gerast limur í løgtinginum fari eg ítøkjuliga at virka fyri og seta fokus á:

Skúladepil við Marknagil
Styrkja fólkaskúlan
Nýtt fróðskaparsetur
Nýtt tjóðsjónleikarhús
Seta í gildi Kyotoavtaluna
Profilera Føroyar og branda ferðavinnuna
Íverksetaraskipanir
Langtíðarætlan fyri rakstur og íløgur hjá landinum
Samskipa lands- og kommunubúskapin
Greið búskaparmál og javna búskapargongd
Innflyta arbeiðsmegi
Styrkja sjúkrahúsverkið - effektiva sjúkraviðgerð.

Hesar verkætlanir og hesi tiltøk eru við til at menna tilverugrundarlag Føroya.

Valstandur er grundarlagið fyri at menna vælferðina, tvs. at vit hava pening, sum vinnan í Føroyum kastar av sær. Tað gevur nevnliga ikki meining at búskaparstýra við ongum pengum í landskassanum. Tí skulu eisini vinnuligu karmarnar styrkjast og mennast.

Vitan og leiðsluroyndir skulu til í politiska arbeiðinum – annars megna vit ikki neyðugar broytingar av føroyska samfelagnum og vinnuni.

Lat okkum ikki standa við sama vegamót um 4 ár. Og lat okkum fyri einaferð skyld hugsa stórt og gera tað, sum við gera ordiligt.

# Vælferð er frælsi og møguleikar



Val X

**KRISTINA BERG**
Tjóðveldi

Vælferð snýr seg ikki, sum Fólkaflokkurin annars leggur upp til, um, at fólk við miðal- og háinntøkum hava meira pening til forbrúk. Økt forbrúk førir til hægri prísir og rakar harvið fólk við lágum inntøkum meinast. Øktur innflutningur førir til hall á gjaldsjavnanum, og øktu prísirnir føra til hægri lønarkrøv og harvið verri kappingarføri.

Nei, vælferð snýr seg um, at ØLL hava møguleika og frælsi at liva eitt gott lív, eisini tá sjúka ella vanlukkur raka. Vælferð snýr seg um, at eisini stakir uppihaldarar, barnafamiljur og pensionistar hava fíggjarligt frælsi til eitt gott lív, og at samfelagið tekur sær væl av teimum sjúku og teimum, sum bera brek.

Barnafamiljurnar skulu hava góð kor í Føroyum. Barnafrádrátturin má hækkað, tá útreiðslurnar hjá barnafamiljum hækkað. Samtíðis eru nógvar ungar familjur, sum hava sett seg í stóra skuld við húsabygging ella húsakeypi. Um barnafamiljurnar rýma av landinum ella ikki koma aftur eftir lokna útbúgving í útlegd, mangla vit fólk her á landi til at arbeiða og menna samfelagið. Eitt undirment samfelag klárar seg ikki í altjóða høpi. Eitt vinnulív, sum manglar skikkaði fólk, klárar seg heldur ikki í altjóða kapping.

Tað er stór semja millum vanlig fólk og serfrøðingar um, at barnsburðarfarloyvið skal vera eitt ár, og at partur av hesum skal kunna takast av pápanum. Tað skal vera púra natúrligt, at pápar ynskja og kunnu taka barnsburðarfarloyvi, eisini fyri arbeiðsgevaran. Men samtíðis má farloyvið vera so lagaligt, at tað ber til hjá teirri einstøku familjuni at leggja farloyvið til rættis soleiðis, sum tað hóskar best hjá teirri einstøku familjuni. Tvs. er talan um stakan uppihaldara, skal hesin, antin tað nú er mamman ella pápin, kunna taka alt tíðarskeiðið sjálv/ur. Hóskar tað betur at taka ein part beinanveg og taka ein part seinni ella sum parttíðarfarloyvi, má hetta eisini bera til.

Fyri stakar uppihaldarar og pensionistar er fíggjarliga tungt at liva í Føroyum. Tá vit hava hjún, sum bara eru saman, tí tey ikki klára seg fíggjarliga einsamøll, og stakar uppihaldarar, sum flyta av landinum, tí tað ikki melur runt, so stendur illani til. Tá er teirra frælsi skert. Við teimum húsa- og leiguprísum, sum eru galdandi serliga í høvuðsstaðarøkinum, er torført hjá støkum uppihaldarum at klára seg við bara einari inntøku. Tey eiga at fáa ágóðan av einum, hægri barnafrádrátti og frípláss.

Tá tosa vit um eitt vælferðarsamfelag, har fleiri hava møguleika og frælsi at liva eitt gott lív. Eitt av hjartamálunum hjá Tjóðveldi er netup veruligt frælsi: frælsi fyri tjóðina, frælst vinnulív og persónligt frælsi.

# Avrikini fyri betri vælferð hava aldrin verið størri



Val X

**HANS PAULI STRØM**
landsstýrismaður, Javnaðarflokkurin

Hesi 4 árini Javnaðarflokkurin hevur havt ábyrgdina av almanna- og heilsumálum, hava avrikini verið fleiri og størri enn í nøkrum øðrum valskeiði. Lat meg bara nevna úr rúgvuni:

Pensjónin hækkað upp til 10.000 fyri stakan og 16.000 kr.mán. fyri giftar pensjonistar
151 nýggj búpláss í eldrarøktini tikin í nýtslu
220 starvsfólk komin aftrat í eldrarøktina
3 nýggj sambýli til sinnisveik sett á stovn
Sosial-, økis og barna- og ungdómspsykiatri økt við 15 mió.
Nýggir stovnar til fjølbrekað børn og autistar
Stuðul til brekað børn hækkað 50% uppí 24 mió
Átøk fyri fólk við skerdum førleika hækkað 100% uppí 30 mió.
Lægsta fyritíðarpensjón hækkað við 1280 kr./mán
Mótrokning í fyritíðarpensjónini lækkað úr 60 í 30%
Diabetes-ambulatorium á øllum 3 sjúkrahúsunum
Læknatænastan økt á 5 serlæknaøkjum
Røntgen- og rannsóknarskipanin á øllum 3 sjúkrahúsunum nútíðargjørd fyri 26 mió.
105 mió kr. til nútímansgerð av Landssjúkrahúsinum, sum fyrsti partur av byggiverkætlan fyri 350 mió.kr.
Fólkaheilsuætlan við fyribyrgjandi heilsukanningum og heilsufremjandi átøkum
Ílegugransking skipað við játtan uppá 3,5 mió.kr.
Nýggj barnaverndarskipan á hægri fakligum støði
Heimleys lógarfestan stuðul til býli og umsorgan

Harumframt hava vit á almanna- og heilsuøkinum lagt framsøknar ætlanir fyri menningina á fleiri høvuðsøkjum, og vit hava eisini tikið fyrstu stigini til at fara undir at seta m.a. hesar ætlanir í verk:

Stig tikin í ætlan fyri Framtíðar Sjúkrahúsverk
Stig tikin í ætlan fyri Framtíðar Eldrarøkt
Stig tikin í ætlan fyri Framtíðar Apoteksverk
Stig tikin í ætlan fyri landsfevnandi

**Uppafturvenjingarskipan**

Stig tikin í bústaðarpolitiskari heildarætlan fyri veikar sosialar bólkar og fólk við serligum tørvi

Stig tikin í langtíðarætlan fyri íløgum í nýggjar bústaðir til menningartarnað, børn og ung við sosialum trupulleikum og sinnisveik.

Javnaðarflokkurin er trygdin fyri, at víðfevndar ætlanir fyri betri vælferð kunnu gerast veruleiki, so sum vit hava prógvað tey seinastu 4 árini.

# Áheitan til tín



Val X

**MARIA JOENSEN**
Javnaðarflokkurin

Havi hoyrt frá fleiri ungum fólkið, at tey tíma ikki á val. Hóast politikkur ikki hevur tín stóra áhuga, so verða nógvar avgerðir tiknar, sum eisini ávirka teg. Ger tína ávirkan galdandi, við at fara á val leygardagin og velja einasta flokkin, ið byggir á, at vit øll skulu hava tað gott. Saman við flokkinum skal eg stuðla tær.

Gott Javnaðarval øll somul.